# Fogh fylgir vanligu mannagongdunum

**Samfelagsfrøðingurin, Bogi Eliasen, sigur, at forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, bert heldur seg til vanligu spælireglurnar í altjóða politikki, tá forsætisráðharrin vísir á, at Føroyar mugu yvirtaka nøkur málsøki, áðrenn limaskapur í EFTA kann gerast veruleiki**

RÍKISFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Framferðin hjá Anders Fogh Rasmussen í samband við føroyska ynskið um limaskap í EFTA er eftir mínum tykki logisk. Tað er vanlig mannagongd, at lond sum ikki hava fullveldið, mugu yvirtaka neyðugu málsøkini, áðrenn tey kunnu gerast limir í altjóða felagsskapum.

Samfelagsfrøðingurin, Bogi Eliasen, er ikki tikin á bóli av útspælinum hjá danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, um EFTA á ríkisfundinum í Leynum mánadagin. Á ríkisfundinum kom fram, at Føroyar millum annað mugu yvirtaka fíggjarmál, loftferðslu og ársroknskaparlógina, áðrenn ein umsókn um limaskap kann latast EFTA.

Bogi Eliasen metir, at Anders Fogh Rasmussen bert heldur seg til vanligu spælireglurnar í altjóða politikki, tá forsætisráðharrin vísir á, at Føroyar mugu yvirtaka nøkur málsøki, áðrenn limaskapur í EFTA kann gerast veruleiki.

-Eg havi sjálvur gjørt kanningar í samband við serritið og í The Right to National Self-Determination, the Faroes and Greenland. Tá setti eg meg í samband við fleiri altjóða felagsskapir og niðurstøðan var greið. Ein meiriluti av altjóða felagsskapunum loyvir londum, sum ikki hava fullveldi, at hava fullan ella avmarkaðan limaskap, um neyðugu málsøkini eru yvirtikin. Hetta var kortini treytað av, at vilji var fyri tí felagsskapinum og at metropolstaturin ( Í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark er Danmark metropolstatur, blðm) vil, greiðir samfelagsfrøðingurin frá.

Bogi Eliasen leggur kortini afturat, at altjóða politikkur snýr seg fyrst og fremst um politiskar semjur heldur enn løgfrøði.

Hann vísir á at megna Føroyar, Danmark og limalondini í EFTA at finna ein felags politiskan leist fyri, hvussu Føroyar kunnu gerast limir í EFTA, uttan at øll málsøki eru yvirtikin, kunnu Føroyar gerast limur í EFTA, hóast tað løgfrøðiliga ikki eigur at bera til.

### Bindir seg

Á ríkisfundinum gav Anders Fogh Rasmussen greitt til kennar, at uttanríkispolitiska heimildarlógin bert gevur Føroyum heimild til at søkja um limaskap í altjóða felagsskapum, sum samstarva um øki, sum Føroyar hava yvirtikið frá dønum.

-Eg haldi tú kanst siga, at forsætisráðharrin við hasi útsøgnini bindir seg til, at føroyingar kunnu fara eftir tí, vit ynskja. So leingi vit hava yvirtikið neyðugu málsøkini, kunnu vit søkja um limaskap í teimum altjóða felagsskapum, uttan at spyrja danir eftir, heldur Bogi Eliasen,

Samfelagsfrøðingurin er kortini skjótur at leggja afturat, at talan er ikki um nakra løgfrøðiliga binding, men talan er heldur um eina politiska binding.

# Størsta bluffnummar nakrantíð

**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, heldur, at ætlanin hjá forsætisráðharranum Anders Fogh Rasmussen at geva Føroyum og Grønlandi sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum er tað reina bluff, sum hann málber seg.**

RÍKISFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Eitt av økjunum, sum Anders Fogh Rasmussen, Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard umrøddu á ríkisfundinum í Leynum mánadagin var framtíðarstøðan hjá Føroyum og Grønlandi í Norðurlandaráðnum. Á tíðindafundinum eftir ríkisfundin segði Anders Fogh Rasmussen:

-Vit vilja arbeiða fyri, at bæði Føroyar og Grønland fáa eina støðu í Norðurlandaráðnum, sum í praksis vil merkja, at londini fara at virka sum sjálvstøðugir limir. Danmark hevur í løtuni formansskapin í Norðurlandaráðnum, og vit fara at taka hetta mál upp við hini limalondini.

Fleiri eru av teirru áskoðan, at útsøgnin hjá Anders Fogh Rasmussen viðvíkjandi sjálvstøðuga limaskapinum í Norðurlandaráðnum prógvar, at danir hava flutt seg í spurninginum um føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum.

Hesum er formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, rúkandi ósamdur við

### Bluff

Í 2003 samtykti eitt einmælt løgting, at Føroyar skuldu gerast sjálvstøðugir og fullgildiguður limur í Norðurlandaráðnum. Kortini vildu danir ikki ganga føroyska ynskinum á møti.

Høgni Hoydal heldur tí nýggju ætlanina hjá Anders Fogh Rasmussen vera tað størsta bluffnummar frá forsætisráðharranum nakrantíð, sum hann málber seg.

Hann vísir á, at hann fleiri ferðir hevur sett Anders Fogh Rasmussen fyrispurningar á Fólkatingið um støðuna hjá Føroyum í Norðurlandaráðnum.

-Ætlanin, hann hevur í hyggju nú, byggir júst á tey svarini, eg havi fingið hvørja ferð á Fólkatingið. Vit hava langt síðan fingið tað, sum Fogh roynir at selja okkum nú. Vit hava í løtuni tvey føroysk umboð í Norðurlandaráðnum, vit hava eisini okkara egnu delegation, umframt at vit eisini eisini hava atgongd til ráðharraráðið, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at Føroyum einans vantar at gerast fullgildigur limur í Norðurlandaráðnum, og tískil er ætlanin hjá Anders Fogh Rasmussen eitt týðandi afturstig.

## FAKTA

Føroyar eiga í dag tveir limir í Norðurlandaráðnum. Hesir eru í skrivandi stund Óli Breckman og Kári P. Højgaard. Hesir hava atkvøðurætt í sambandi við avgerðir hjá ráðnum. Tað er løgtingið, sum velir hesi umboðini. Landsstýrismenn kunnu taka lut í Ráðharraráðunum. Landsstýrismaður í Norðurlandamálum er í løtuni Jógvan við Keldu.

18. mars 2003 samtykti løgtingið við 30 atkvøðum fyri og ongar ímóti at søkja um fullan limaskap í Norðurlandaráðnum. Síðani er eingin samtykt gjørd á Føroya løgtingi hesum viðvíkjandi.

Ein føroyskur fullur limaskapur merkir Helsinkisáttmálanum, sum ásetir samansetingini og samstarv millum Norðurlond. At Føroyar ikki hava fullan limaskap í Norðurlandaráðnum merkir eisini, at Føroyar einki rinda fyri at vera við.

# Rullar inn hjá Kaupthing


*Kaupthing hevur økt um sítt virksemi, og tað sæst aftur í roknskapinum*

**Kaupthing hevði 3,7 milliónir krónur í yvirskoti fyrstu seks mánaðir av 2005**

ROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag hevur økt so mikið nógv um sítt virksemi higartil í ár, at tað hevur givið 3,7 milliónir í yvirskoti - áðrenn skatt. Sama tíðarskeið í fjør gjørdist úrslitið eitt undirskot áljóðandi 298 krónur. Tá skattur er farin av fyri fyrra hálvár í ár, so kann Kaupthing leggja tríggjar milliónir afturat sínum eginpeningi.

Siga vit, at yvirskotið verður eins stórt fyri juli til desember 2005, so verður eginpeningurin rentaður við 43% fyri alt árið. Eginpeningurn var við árslok smáar seytjan milliónir, og tað gevur tað bestu prosentvísu rentingina av føroysku fíggjarstovunum higartil fyri fyrra hálvár.

### Økt virksemi

- Inntøkurnar vóru 124% hægri enn fyri sama tíðarskeið í fjør, og útreiðslurnar vóru 32% hægri fyri tíðarskeiðið, skrivar Kaupthing í tíðindaskriv.

Í roknskapinum sæst framgongdin undir teiginum "aðrar vanligar inntøkur".

- Vit hava havt eina framgongd á øllum økjum. Tað veri seg bæði økt virksemi innan handil við virðisbrøvum og økt virksemi innan vinnutænastuøkið, sigur Peter Holm, stjóri fyri Kaupthing.

Vinnutænastuøkið snýr seg um útlán til vinnulív og ymiskar ráðgevingaruppgávur - t.d. í sambandi við handil við fyritøkum, har Kaupthing t.d. stóð fyri keypinum av Kall, sum fyritøkan eisini átti ein part av, men tað ávirkar ikki úrslitið fyri fyrstu seks mánaðirnar av árinum.

- Seinna hálvár verður væntandi eins gott og fyrra hálvár, sigur Kaupthing í tíðindaskri.

Tað er íslendski Kaupthing Bank hf., sum eigur Kaupthing Virðisbrævameklarafelag.